# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

NSÍ – Dynamo Tbilisi 1-0 (1-0)

# Georgisku meistararnir niður á knæ

**Men bara í fyrra hálvleiki, tá NSÍ eisini skoraði einasta málið, sum fall í dystinum í gjár. Í seinna hálvleiki tók Dynamo Tbilisi yvir aftur, og spældi seg trygt víðari**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Runavíkingar vóru omaná í fyrra hálvleiki, og áskoðararnir vóru bjartskygdir fyri víðari luttøku í hálvleikinum. Soleiðis skuldi tó ikki ganga*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Framgongdin hjá føroysku feløgunum á altjóða leikvallum hevur verið støðug seinnu árini. Tíðin har skrædlini var gerandiskostur seinast í nítiárunum er burtur. Tað staðfesti NSÍ eina ferð enn í gjár, tá runavíkingar í regninum í Gundadali vann á georisku meistarunum Dinamo Tbilisi. Sigurin broytti lítið í samlaða úrslitnum, har gestirnir vunnu seg víðari við trimum málum móti einum.

### Løgdu væl út

Vónirnar fyri víðari luttøku vóru ongar hjá runavíkingum undan dystinum. Dinamo Tbilisi vann sannførandi á heimavøllinum. Tá klokkan nærkaðist átta í gjárkvøldi vóru teir fáu hundrað áskoðararnir hinvegin bjartskygdir. Og tað var ikki løgið.

Føroyingarnir vóru nærlagdir og ágangandi í fyrra hálvleiki. Fleiri ferðir eydnaðist at spæla seg til vandamiklar støður móti stinnu georgisku verjuni. Øssur Dalbúð og Hjalgrím Elttør stóðu seg væl úti í hvør sínum borði, meðan vongverjin í vinstru, Einar Hansen, ikki smæddist við at taka lut í framrættaða spælinum.

Eftir áhaldandi trýst, uttan málmøguleikar, eydnaðist NSÍ at leggja seg á odda. Károly Potemkin vann aftur ein av sínum fleiri nærdystum, áðrenn Øssur Dalbúð fór til stroks í høgru. Hann legði bóltin fyri føturnar á Hjalgrími Elttør, sum uttan trupulleikarsendi framvið málverjanum.

Møguleikarnir vóru eisini at økja um leiðsluna. Øssur Dalbúð var ótrýstur, tá hann ikki fekk skot á innleggið frá Boga Løkin, meðan heimaliðið ongantíð gjørdist veruliga vandamikið eftir deyðbóltsstøðurnar.

### Gestirnir ressast við

Tað bleiv tó ongantíð so spennandi, sum vónað og væntað var. Rainer Zobel, venjari, hevur helst givið leikarunum nøkur borgarlig orð í hálvleikinum. Tað var í øllum førum eitt mest sum hamskift lið, sum trein á vøllin til seinna umfar. Leikliga vóru gestirnir omaná, meðan framvegis var trupult at spæla seg ígjøgnum verjuna hjá runavíkingum. Vandamestu royndina átti Levan Khmaladze eftir lítlari løtu, tá Jens Martin Knudsen – uttan topphúgvu – bjargaði á tvørtræið.

NSÍ hevði ikki neyðugu orkuna at søkja at eftir hvíldina, og so smátt mistu leikarar og áskoðarar trúnna á, at tað ómøguliga var gjørligt.

NSÍ vann við einum máli móti ongum, sum geva Føroyum kærkomin stig í altjóða høpi. Altjóða uppgávan hjá føroyameistarunum er av á hesum sinni, og nú skulu runavíkingar savna tankarnar um landskappingina.

## FAKTA um dystin

**NSÍ – Dinamo Tbilisi 1-0 (1-0)**
*Dinamo Tbilisi vann samanlagt 3-1.*
*Seinni dystur í fyrsta innleiðlandi umfari av Champions League.*
*Týsdagin 22. juli klokkan 19.00 á ovara vølli í Gundadali í Tórshavn*
**Dómarakvartett úr Finnlandi:** Tero Nieminen, Miikka Poikselka, Jan-Peter Aravirta og Heikki Pajunen.
**UEFA eygleiðari úr Onglandi:** Adrian Titcombe
**UEFA dómara eygleiðari úr Litava:** Jonas Braga
**1-0:** Hjalgrím Elttør, 16.
**NSÍ:** 1. Jens Martin Knudsen – 2. Aco Pandurovic, 8. Johan Troest Davidsen, 3. Óli Hansen, 12. Einar Hansen – 14. Bogi Løkin, 6. Milan Petric (18. Sjúrður Jacobsen, 75.), 7. Nenad Stankovic – 16. Øssur Dalbúð (13. Klæmint Olsen, 83.), 9. Károly Potemkin (15. Filip Jacobsen, 83.), 10. Hjalgrím Elttør
**Gult kort:** Eingin
**Venjari:** Johan Nielsen
**Dinamo Tbilisi:** 12. Didier Janvier Ovono Ebang – 22. Shota Kashia, 7. Guram Kashia, 4. Aleksandr Intskirveli, 20. Giorgi Nergadze – 49. David Odikadze, 8. Levan Khmaladze, 18. David Digmelashvili, 21. Oleg Gvelesiani (5. Jishkariani, 90.) – 23. Nikoloz Pirtskhalava (16. Milos Krshko, 46.) – 11. Mate Vatsadze (14. Kantaria, 80.)
**Gult kort:** Vatsadze 35., Nikoloz Pirtskhalava 43.
**Venjari:** Rainer Zobel

## Fantastisk kensla

Hóast runavíkingar einu løtuna vóru sera bjartskygdir fyri víðari luttøku í kappingini, so staðfesti liðskiparin Óli Hansen, at kenslan var fantastiskt eftir dystarlok.

– Vit eru sera, sera glaðir um hendan sigurin. Vit hava vunnið á georgisku meistaraliðnum, sum eru yrkisleikarar, so tað er óført.

Tit vóru sera ágangandi í fyrra hálvleiki, og tit høvdu møguleikar at økja um leiðsluna. Iðra tit tykkum ikki um, at tað ikki eydnaðist at hótta leiðsluna hjá teimum av álvara?

– Jú, sjálvandi. Men vit eru glaðir fyri hendan sigurin. Tá vit løgdu okkum á odda høvdu vit eisini trúnnað á, at tað kundi lata seg gera. So líðandi út á seinna hálvleik hugsaðu vit kanska meira um bara at varðveita leiðsluna, vit høvdu. Ikki tí, vit royndu eftir steðgin eisini, men blivu ongantíð vandamiklir, sigur Óli Hansen.

Leikliga stóð NSÍ einki aftaná fyri georgisku meistararnar í gjár. Í fyrra hálvleiki vóru føroyingarnir omaná, meðan hvørki av liðunum av álvara søkti at eftir hvíldina. Grundleggjandi munurin var veðurlagið.

– Tað vóru fyrst og fremst 20 hitastig á muni. Tað var ein stór broyting. Fyrsta hálva tíman á útivølli fingu vit trý mál ímóti okkum, og so ræddi fyrst og fremst um at gera ósigurin so lítlan sum gjørligt. Graslíkið var eisini ein fyrimunur hjá okkum hesaferð, men tað var grasvøllurin eisini hjá teimum, so har er einki at fara eftir, staðfestir liðskiparin hjá NSÍ, Óli Hansen.